Grønlandsposturin:

# Nyrup vil bara ræða føroyingar

– Einasta endamálið hjá danska forsætisráðharranum er at ræða føroyingar frá at siga »ja« á eini komandi fólkaatkvøðu, skrivar Grønlandsposturin í oddagreinini týsdagin. Blaðið eggjar føroyingum til ikki at lata hesar hóttanir við seg koma, tá krossurin skal setast

FÓLKAATKVØÐAN
*Stefan í Skorini*



*Nyrup minnir mest um ein keisara, sum e r bebbaræddur fyri at missa ein part av ríkinum. Hetta sigur Grønlandsposturin um hóttanirnar hjá Nyrupi um, at siga føroyingar »ja«, so eru Føroyar ikki longur ein partur av ríkinum*

Grønlendingar fylgja væl við sjálvstýristilgondini í Føroyum. Hetta vísir oddagreinin í Grønlandspostinum týsdagin 13. februar, har politiska støðan í Føroyum verður umrødd. Blaðið metir støðuna soleiðis, at atburður Nyrups mest minnir um ein keisara, sum ikki vil hoyra taling um at missa ein part av sínum litla ríki.

Grønlandsposturin metir, at tann nýggja sjálvstýrisleiðin er eitt innanhýsis mál hjá føroyingum, sum føroyingar tískil altíð skulu kunna arbeiða við uttan stórvegis uppílegging úr Danmark.

Men ístaðin hóttir Nyrup føroyingar við at siga, at um føroyingar velja at halda fram við sjálvstýristilgongdini fram til eina endaliga fólkaatkvøðu í 2012, so verður eingin blokkstuðul eftir fýra ár, og Føroyar eru ikki longur ein partur av Ríkisfelagsskapinum.

Grønlandsposturin metir tó ikki, at Nyrup fer at gera álvara av sínum hóttanum, um føroyingar siga »ja« hóast álvarsamar hóttanir úr Danmark.

Nyrup fer ikki at tveita Føroyar úr felagsskapinum, tí Danmark verður til láturs um allan heimin og fer at missa virðing frá øðrum londum, um hetta verður framt í verki, metir grønlendska blaðið.

## Nyrup illa sperdur

Nyrup verður lagdur undir at dyrgja eftir veljarum og samstarvi við aðrar politikarar, hvørs sjónarmið broytast, alt eftir hvørja ætt vindurin blæsur. Hetta er t.d. hent í málinum um innflytarar og flóttafólk í Danmark. Eisini er hetta tilfelli við føroyamálinum.

Nyrup er illa sperdur á politiska vígvøllinum í heimlandinum, tí veljarakanningarnar ikki ganga honum eftir vild. Tí er hann harður við føroyingar og biðjur teir heldur fara á navarin, um teir vilja hava størri sjálvstýri. Og forsætisráðharrin vónar, at nógvir danskir veljarar fara at taka undir við hesum sjónarmiði.

Viðferðin, Nyrup gevur føroyingum, er sostatt bara ein liður í at fáa fleiri atkvøður á næsta Fólkatingsvali. Eitt val, sum Nyrup ikki fer at vinna, hóast hann dúgliga roynir eftir atkvøðum við at populerum sjónarmiðum um Føroyar.

## Farið óttaleysir á val

Grønlandsposturin heitir á føroyingar um at fara óttaleysar val og atkvøða, sum teir halda vera rætt uttan at hugsa um hóttanirnar úr danska forsætismálaráðnum, tí einki ítøkiligt er í ræðuherferðini hjá Poul Nyrup Rasmussen.

Tó er tað harmiligt at síggja, at føroyingar lata seg ávirka av orðum Nyrups, sum veruliga hevur havt eydnuna við sær við sínum hóttanum. Hann hevur jú sagt, at eitt »ja« merkir, at pengakassin verður stongdur eftir fýra ár.

Hetta sær út til at fara at ávirka atkvøðuna í mai, tí um tað merkist á pengapunginum beinanvegin, hava fólk hug at hveppa seg við at siga »ja«. So hevur Nyrup rokkið sínum endamáli. Hesin taktikkur er nýttur fyrr við góðum úrsliti.

Grønlandsposturin vónar, at føroyingar fara á val í mai uttan at hava orð Nyrups fremst í huganum, men heldur teirra egnu sannføring um henda spurning.

# Ein føroysk loysn sum setir stór krøv

Skipafelagið Føroyar er nú av álvara við í oljuvinnuni. Árni Joensen, stjóri metir ikki, at tað verður neyðugt við at gera serligar íløgur, tí teir hava longu alt “apparatið”, sum skal til. Hann er sera fegin um, at oljufeløgini hava valt eina føroyska loysn og sum eru kappingarfør

ÚTGERÐARHAVN
*Jan Müller*



*Árni Joensen*

– Tað er altíð stuttligt at vinna eina kapping, og vit eru sera spentir at fara í gongd við hesa uppgávuna sigur Árni Joensen, stjóri í Skipafelagnum Føroyar, sum saman við stjóranum í Atlantic Supply Base nú kann frøðast yvir, at felags insatsur teirra hevur borið ávøkstur. Talan er um eina bæði stóra og áhugaverda avbjóðing, sum setir veldug krøv til nýggjar mannagongdir ol. – Hetta gevur okkum ein møguleika at útvikla okkara kompetansu sigur skipafelagsstjórin. Hvat viðvíkur plássinum, so kunnu teir arbeiða út frá fleiri plássum, men tað er er uppá nógvar mátar meira praktiskt, at útgerðarstøðin liggur í Runavík. Árni Joensen heldur, at teir hava givið eitt realistiskt tilboð, har tað hvørki er smurt ov nógv uppá ella har man ikki tjenar pengar upp á tað.

Árni Joensen metir annars avgerðina hjá oljufeløgunum byggja á ta sannføring og sannroynd, at teir eru kappingarførir. – Tað er eingin, sum hevur sama møguleika sum vit at brúka verandi ressursir. Vit hava apparatið sum er og skulu tí ikki til at gera nakrar stórar íløgur. Hetta átti at givið nakrar fyrimunir heldur hann.

Árni Joensen dylur ikki fyri, at hann er sera fegin um, at man her hevur valt eina reint føroyska loysn. –Tað er tað einasta rætta, um hon er kappingarfør, og má hetta eisini sigast at liva upp til andan í oljulóggávuni. Hann heldur tað eisini vera sera skilagott og eitt rætt signal at senda út, um vit sum føroyingar ætla okkum út í oljuvinnuna, at fleiri føroyskar fyritøkur her hava tikið seg saman. –Men vit vilja heldur enn gjarna kunna víðka hetta samstarvið. Talan er um nøkur virki, sum eru farin saman og senda eitt felags signal út. Tað merkir ikki, at tey virkini, sum eru við í samtakinum, hava nakrar serligar fyrimunir. Kortini haldi eg tað er rætt av øðrum virkjum eisini at koma við í hetta samstarvið.

Tað ber ikki til at siga, at Skipafelagið Føroyar er komið lætt til hesa uppgávuna. Eitt stórt arbeiði liggur aftanfyri, og hava fólk frá felagnum verið við á øllum oljuráðstevnum og tiltøkum annars, sum hava kunnað givið vitan og kontaktir.